Sjúkrahússtjórin heldur seg einki skeivt hava gjørt

Skilir ikki brævið, sum landsstýrismaðurin í heilsumálum sendi Sosialinum fríggjadagin - har hesin hótti við at siga sjúkrahússtjóran upp vegna úttalisi í fjølmiðlunum

-Eg dugi ikki at síggja, hvat eg skal hava sagt skeivt og sum kann hava verið orsøkin til, at landsstýrismaðurin í heilsumálum nú leggur meg undir at reka politikk ímóti løgtingi og landsstýri. Hetta brævið, sum verður prentað í Sosialinum og Dimmalætting leygardagin kemur ógvuliga óvart á meg, tí eg rætt og slætt skilji ikki, hvat landsstýrismaðurin sipar til sigur Høgni Joensen, sjúkrahússtjóri í eini viðmerking til almenna hóttanarbrævið, sum Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður lat bløðunum í farnu viku.

Høgni Joensen sigur, at hann herfyri varð uppringdur av Dimmalætting, sum setti sær spurningar viðvíkjandi sjúkrahúsverkinum. Niðurstøða mín var tann, at tað er ein politiskur spurningin antin vit skulu hava eitt ella fleiri sjúkrahús.

Samrøðan við Dimmalætting

Úttalilsini hjá sjúkrahússtjóranum í Dimmalætting hósdagin 10. juni vóru hesi:

"Sæð út frá einum fíggjarligum sjónarmiði, høvdu vit sjálvandi fingið meira fyri pengarnar við einum sjúkrahúsi, men trupulleikin er, at man vil hava hesa tænastuna í samfelagnum við sjúkrahúsi í Klaksvík og Suðuroy".

Og aðrastaðni sigur Høgni Joensen:

"Skulu vit sammeta okkum við aðrar tjóðir er tað ikki rætta loysnin at hava so nógv sjúkrahús av tí, at henda loysnin er ov dýr. Og tað ber ikki til at breiða so háteknologiska viðgerð, sum er á einum sjúkrahúsi í dag, út á fleiri støð."

-Men heldur tú, at tú við hesum úttalilsunum hevur misbrúkt títt starv sum embætismaður?

-Nei, tað meti eg ikki.

Politiskur spurningur

-Hevur tú sum sjúkrhússtjóri alment gingið inn fyri, at vit áttu at havt eitt heldur enn trý sjúkrahús?

-Nei tað havi eg ikki. Eg havi tvørturímóti alla tíðina sagt, hetta er ein politiskur spurningur.

-Er tað løgið, at arbeiðsgevari tín fer í bløðini heldur enn at tosa beinleiðis við teg um hetta málið?

-Eg kann ikki leggja meg út í, um politikarnir vilja brúka fjølmiðlarnar.

Sjúkrahús og prísur

-Men er tað nøkur loyna, at Høgni Joensen heldur tað hevði verið bíligari og betri fyri Føroyar at havt eitt heldur enn trý sjúkrahús?

-Tað er bíligari, men um tað er betri skal eg ikki úttala meg um. Tað eru sjálvandi so mong onnur kriteriur tú velur út frá annað enn bara prísin.

-Nú er tú sjúkrahússtjóri fyri øll sjúkrahúsini. Undir ordaskiftinum í tinginum um avtaluna við danir var víst á, at danir - skulu teir figgja undirskotið á komandi figgjarlóg - fara neyvan at góðtaka, at vit reka 3 sjúkrahús. Heldur tú teir fara at koma við einum slíkum kravi?

-Tað veit eg ikki. Enn hava teir so ikki sett nakað slíkt krav. Danir hava annars játtað at gera eina kanning av føroyska sjúkrahúsverkinum.

Vit hava roynt at fingið eina viðmerking frá landsstýrismanninum. Men har er burturstæddur. Vit hava tí spurt løgmann, hvat hon kennir til málið.

Marita Petersen sigur seg onga viðmerking hava.

Upp á fyrispurning um málið hevur verið viðgjørt í landsstýrinum sigur løgmaður, at tað hevur tað ikki.

jan



Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður: -Tá ein sum embætismaður ikki longur megnar loyalt at røkja sítt starv má ein víkja sessis



Hvør skal reka politikkin?

Sjálvandi skal tað fyri tann einstaka borgaran vera ein sjálvsagdur rættur fritt at tala og skriva um samfelagsins viðurskifti. Hetta er ein av lunnunum undir einum samfelag, sum byggir á fulkaræði.

Hetta gevur borgarum møguleikar at vísa á sína negd ella ónegd. Just í hesum dagum er tað vera umráðandi, at hesin rættur gevst.

Borgarin fær í fyrsta lagi møguleikan at loysa upp fyri sínum aggressjonum, men í øðrum lagi kann eitt breitt kjak um viðkomandi evni føra við sær, at politiski myndugleikin fær neyðugu breiddina fyrsta, áðrenn støðutakan.

Alt gott um tað

Men nú hevur sjúkrahússtjórin eitt vinalað tíkið hiðfyri frá munninum og hevur beinleiðis í blaðinum lagt seg út í eitt politiskt kjak um okkara sjúkrahúsverk.

Týðuligra og greitt verður boðað frá, at hann er ímóti at hava trý sjúkrahús og nevnir tað sum ein trupulleika, at ein politisk avgerð er tikin um, at so skal vera. Hetta er annars eitt samhæri lóg.

Eg setti mær ikki í fjølmiðlunum at viðgera hendu trupulleika at landsins tænastumenn bruka umstingarliga sess sín at reka ein politikk ímóti løgtingi og landsstýri, tí tað verður viðgjørt í aðrum forum.

Men fyri norðoyingar og fyri suðuroyingar og fyri starvsfólk og útlan ivi fyri fúla fjørd, ma tað kennast arkvitandi, at ovasta dagliga leiðlan hevur hendu boðskap. Men latið tykkum ikki taka av fokum, tí her verða fleiri um at ráða.

Spurningurin um loysiligt má so takast upp av landsstýrinum. Í sonnta álvara, tí aðrastaðni eru vit ikki barrar yvir, hvat annars kann henda.

Svarið til tænastumenn, sum koma í eina slíka konflikt við sín arbeiðsgeving og tað er hóast alt ein erlig sak, ma so vera at vikja sessinum, tá ein ikki longur loysir megnar at røkja sítt starv.

Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður

Brævið Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður lat fjølmiðlunum í farnu viku

føroyska sjúkrahúsverkið

– Sæð frá einum fíggjarligum sjónarmiði, høvdu vit sjálvandi fingið meira fyri pengarnar við einum sjúkrahúsi, men trupulleikin er, at man vil hava hesa tænastuna í samfelagnum við sjúkrahúsi í Klaksvík og Suðuroy.

Høgni Joensen sigur, at tað tann loysnin við trimum sjúkrahúsum er ov dýr. Og tað ber ikki til at breiða so háteknologiska viðgerð, sum er á einum sjúkrahúsi í dag, út á fleiri støð.

– Aðrastaðni verða lokalu sjúkrahúsini niður-

Úttalilsini hjá Høgna Joensen í Dimmalætting herfyri